## Stórur brúktbilamarknaður

**10.000 kr. av hvørjum bili - restina av oktober mánaða!**

| | |
|---|---|
| **Mazda 323 F 1,8i GLX** Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 35.000, árg. 11/98 — **119.000,-** | |
| **Mazda 323 S 1,5i LX** Bláur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 39.000, árg. 06/97 — **97.000,-** | |
| **Mazda 323 F 1,6i GLX** Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km. 102.000, árg. 04/96 (Sýnaður 11/00) — **65.000,-** | **Renault Megane 1,4e** Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 58.000, árg. 04/97 — **120.000,-** |
| **Mazda 323 F 1,5i GLX** Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km. 8.000, árg. 08/00 — **148.000,-** | **Renault Megane 1,6e Sedan** Beige, 4 hurðar, 5 gear, Km. 35.000, árg. 06/98 — **120.000,-** |
| **Mazda 323 F 1,5i GLX** Gráur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 7.000, árg. 03/00 — **134.000,-** | **Renault Twingo** Reyður, 3 hurðar, 5 gear, Km. 48.000, árg. 04/99 — **84.000,-** |
| **Mazda 323 S 1,5i LX** Reyður, 4 hurðar, 5 gear, Km. 68.000, árg. 05/97 — **90.000,-** | **Honda Accord 2,0i Vtec** Grønur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 44.000, árg. 11/99 — **185.000,-** |
| **Mazda 323 S 2,0 Diesel LX** Bláur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 112.000, árg. 06/98 (Sýnaður 12/00) — **120.000,-** | **Peugeot 106 Diesel** Bláur, 3 hurðar, 5 gear, Km. 88.000, árg. 11/95 — **66.000,-** |
| **Mazda 323 S 2,0 Diesel LX** Gráur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 74.000, árg. 06/98 — **125.000,-** | **Renault Megane 1,6e** Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km. 60.000, árg. 12/96 (Sýnaður 09/00) — **100.000,-** |
| **Mazda 323 S 2,0 Diesel LX** Bláur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 108.000, árg. 02/98 — **118.000,-** | **Renault Megane 1,4e** Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km. 35.000, árg. 08/98 — **115.000,-** |
| **Mazda 323 S 2,0 Diesel LX** Reyður, 4 hurðar, 5 gear, Km. 113.000, árg. 06/98 — **115.000,-** | **Ford Escort Tuscany Turbo Diesel** Hvítur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 112.000, árg. 05/97 — **88.000,-** |
| **Mazda 626 HB 2,0i GLX** Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km. 197.000, árg. 11/87 (Sýnaður 04/01) — **38.000,-** | **Ford Escort St.car 1,6 Zetec** Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 33.000, árg. 06/98 (Sýnaður 06/01) — **124.000,-** |
| **Mazda 929 S 2,2i GLX** Bláur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 145.000, árg. 03/89 (Sýnaður 05/01) — **45.000,-** | **Fiat Tempra S.W.1,6i.e. St.car** Gráur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 68.000, árg. 07/95 (Sýnaður 09/00) — **68.000,-** |
| **Ford Sierra** Gráur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 98.000, árg. 10/93 (Sýnaður 07/00) — **47.000,-** | **Kia Sephia 1,5i GTX** Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 38.000, árg. 05/97 — **68.000,-** |
| **Toyota Corolla 1,6 Luna** Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km. 38.000, árg. 04/98 — **122.000,-** | BERG MOTORS |
| **Toyota Carina Sedan 1,8 CDX** Grønur, 4 hurðar, 5 gear, Km. 44.000, árg. 10/97 — **128.000,-** | BERG MOTORS |
| **Renault Megane 1,4e** Grønur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 34.000, árg. 08/98 — **110.000,-** | BERG MOTORS |
| **Ford Mondeo** Reyður, 4 hurðar, 5 gear, Km. 80.000, árg. 01/95 (Sýnaður 01/00) — **85.000,-** | BERG MOTORS |
| **Toyota Carina St.car** Hvítur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 61.000, árg. 06/91 (Sýnaður 01/01) — **58.000,-** | BERG MOTORS VØRUVOGNAR VØRUVOGNAR VØRUVOGNAR Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35 |
| **Ford Escort 1,8 Diesel St.car** Gráur, 5 hurðar, 5 gear, Km. 85.000, árg. 05/96 (Sýnaður 05/01) — **98.000,-** | |
| **Ford Escort 1,8 Turbo Diesel St.car** Reyður, 5 hurðar, 5 gear, Km. 44.000, árg. 08/97 (Sýnaður 02/00) — **130.000,-** | |
| BERG MOTORS | **Ford Courier 1,8 Diesel** Reyður, 4 hurðar, 5 gear, Km. 95.000, árg. 92 — **35.000,-** |

**BERG MOTORS**
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35


## Eysturoyar Tjóðveldisfelag

1. uppstillingarfundur verður mikukvøldið 31. oktober kl. 20.00 í hølum Gøtu Menningarfelags (1929 skúlin).

Tingmenn úr flokkinum luttaka.

## Nes hagi til sølu

**til haruskjóting til hægstbjóðandi.**

Verður seldur mikukvøldið kl. 20.00, við ella inni í seyðahúsinum hjá Jógvan Elias Davidsen.

**Hagastýrið**

## Søkt verður eftir tímalærara

**frá 1. des. 2001 til 30. juni 2002**

Søkt verður eftir tímalærara at undirvísa í sponskum, 6 tímar um vikuna.

- 4 tímar í sponskum B, herav verða 2 tímar í sponskum C integrerað.
- 2 tímar spanskt C.

**Førleikakrøv**
Hægri útbúgving, handilsháskúla, lærdan háskúla, handilsfaklærarprógv. Umsøkjarar við vinnulívsroyndum hava fyrimun.

**Setanartreytir**
Sum tímalærari í skúlaárinum 2001/2002.

**Løn**
Í lønarrensli 13/21/24, 18/21/26/29/30, 16/21/29/31 hjá HL ella eftir avtalu.

**Umsóknarfreist**
Umsóknin skal vera Føroya Handilsskúla á Kambsdali í hendi í seinasta lagi 13. nov. 2001. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til deildarstjóran.

**Føroya Handilsskúli**
Kambsdalur
530 Fuglafjørður
Tlf. 444900 - fax 444901
e-mail: fh@kambsdal.olivant.fo







# Sosialurin skrivstovu á Christiansborg



*Christiansborg er karmurin um nógv politiskt virksemi, sum viðvíkur Føroyum og føroyingum. Frá skrivstovu síni har fer Sosialurin sum fyrsta føroyska blaðið at fylgja hesum virkseminum. Journalisturin Magnus Dam fer at taka sær av fyrifallandi uppgávum á Christiansborg*

*Mynd Jan*

**Sum fyrsta føroyska blað hevur Sosialurin stovnað redaktión á Christiansborg og fer blaðið at hava fólk til at taka sær av journalistiskum uppgávum í tí fjølbroytta politiska umhvørvinum har**

MIÐLAR
*Jan Müller*

Seinastu árini hevur Christiansborg verið karmur um stóran part av tíðindaflutninginum í føroysku miðlunum. Hetta hevur m.a. eyðkent tíðindaflutningin í Útvarpi Føroya. “Føroyska Tíðindatænastan” í Keypmannahavn, sum hevur latið útvarpinum tíðindi fleiri ferðir um vikuna, hevur havt innivist millum hini mongu fjølmiðlafólkini á Christiansborg. Á tann hátt hevur verið lættari at taka pulsin, hvat hendir á tí politiska leikpallinum og ikki minst handan leiktjøldini. Har verða nógvar avgerðir tiknar, sum hava antin beinleiðis ella óbeinleiðis avleiðingar fyri Føroyar og føroyingar. Serstakliga síðani núverandi samgongan setti fullveldið út í kortið er føroyska fjølmiðlavirksemið á Christiansborg nógv økt.

Sosialurin, sum nú í eina tíð hevur roynt at fáa innivist á politisku háborgini í hjartanum á danska høvuðsstaðnum, soleiðis at blaðið betri kann fylgja við og skjótari kunna lesararnar í Føroyum um tað, sum fyriferst í Fólkatinginum og í tí politiska umhvørvinum annars, fekk nú um dagarnar játtandi svar uppá umsókn sína um at fáa innivist millum nógvar aðrar miðlar.

Tað er stórur gravgangur eftir at fáa skrivstovupláss til journalistar á Christiansborg. Og í eina tíð hevur Føroyska Tíðindatænastan verið einasti føroyski fjølmiðilin, sum hevur átt fast innivist har. Til nú eisini Sosialurin sum fyrsta føroyska blað hevur fingið fótin inn um gátt. Ikki tí at talan er um nakra stóra redaktión. Blaðið hevur fingið eini høli og ymsa útgerð til taks soleiðis at blaðið í framtíðini kann bera føroyingum í Føroyum og Danmark tíðindi og myndir beinleiðis av Christiansborg. Nýggja tøknin ger hetta møguligt. Hesi tíðindi verða so atgongilig bæði í pappírsblaðnum og í elektroniska internetblaðnum.

Blaðið fær fasta postadressu á Christiansborg og fær tá eisini alt tað tilfar, sum fólkatingslimir og hinir miðlarnar fáa atgongd til. Tað er so eisini so mikið heppið, at hølini, sum blaðið skal húsast í, liggja sera høgliga fyri, á somu hædd og stutt frá skrivstovunum hjá teimum báðum føroysku fólkatingsmonnunum. Annars eru eisini fleiri aðrar tíðindastovur júst har, eitt nú nýggja blaðið Weekend Nu, Ekstra Bladet og Radikala Tíðindatænastan.

Føroyski journalisturin Magnus Dam, sum er farin til Danmarkar at nema sær løgfrøðiliga útbúgving, fer at standa fyri redaktónini hjá Sosialinum á Christiansborg. Talan er um at hava fólk á redaktónini, tá tørvur er á tí. Nú tað stundar til fólkatingsval vil tað vera sera hent at hava fólk á staðnum. Annars metir leiðslan á Sosialinum, at tá samskiftið millum Føroyar og Danmark her ikki minst á tí politiska økinum uttan iva fer at vera nógv komandi árini – uttan mun til hvør situr við valdinum í londunum báðum – so krevur hetta, at tú hevur fólk á staðnum.



*Sosialurin hevur fingið sína egnu postsmogu millum allar tær mongu hjá øðrum fjølmiðlum Christiansborg. Her fer Magnus Dam eftir seinasta postinum*

*Mynd Jan*



*Redaktiónin hjá Sosialinum á Christiansborg hevur gott útsýni*

*Mynd Jan*